## Føroysk jól í Oslo

Eins og undanfarin ár, verdur skipað fyri føroyskari jólagudstænastu í tí sera hugnaligu ensku kirkjuni í Oslo, Skt. Edmund Church. Hon liggur á Møllergaten 30, nær við Youngstorgið. Gudstænastan verður sunnudagin 9. desember kl. 16. Gudstænastan verður skipað sum ein vanlig føroysk jólagudstænasta við kendum jólasálmum, prædiku yvir jólaevangeliið, og framførslu av sangi frá føroyskum sangfuglum. Eftir gudstænastuna verður høvi til sosiala samveru, tá farið verður niður undir í tann hugnaliga kirkjukjallarin, har bjóðað verdur kaffi, saft og kakur. Øll eru hjartaliga vælkomin til hetta tiltak.



## Samstarv við Kina

**Klaksvík:** Í kvøld kl. 19:30 verður spennandi fundur í býráðshøllini í Klaksvík. Tá verður nevniliga ein framløga um Kina í fiskivinnuhøpi, og sum ein flokkur á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna skipa fyri. Tey hava verið námsferð í hesum spennandi landinum, og fara Magnus Pauli Magnussen, lærari og næmingarnir Jóan Karl Joensen og Hans Pauli Johannesen Hentze at greiða frá ferðini, eins og eitt kjak verður aftaná um framløgurnar. Her luttaka Carl á Lag, stjóri á SNG ið hevur royndir í samskifti við Kina; Durita í Grótinum frá JFK og Lynn Reveal, lærari og sum var við á ferðini.

# Betri umstøður til næmingar

**Fyrsta stig í eini nútíðargerð av Stranda skúla er nú tikið. Bygdaráðið hevur samtykt at byggja Stranda skúla út, í fyrsta umfari fyri 12 mió krónur.**

SKÚLI

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Strendur:** Seks nýggjar skúlastovur.

Tað er ein fylgja av samtyktini, sum bygdaráðið tók á seinasta fundi sínum.

Á skránni var útbyggingin av tí skjótt 40 ára gamla skúlanum í bygdini, og sum so líðandi hevur tørv á eini nútíðargerð.

Ætlanin er at byggja skúlan út í stigum, og fevnir henda samtyktin bert um fyrsta byggistig. Seinni verður farið undir 2. byggistig, sum millum annað fevnir um at nútíðargera verandi stovur.

Kostnaðurin fyri fyrra stigið er mettur til 12 mió krónur, og av hesum játtaði bygdaráðið 7 mió krónur á fíggjarætlanini fyri 2008.

- Hetta er ein stórur biti fyri kommununa. Men hetta er kortini ein íløga, sum má gerast, staðfestir borgarstjórin í Sjóvar kommunu, Malena Thomsen.



*Næmingar hava undirvísing í tónleiki í missiónshúsinum á Strondum, ið liggur beint við skúlan. Um nøkur ár verða hesar umstøðurnar munandi betri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í Stranda skúla ganga beint undir 200 næmingar hetta skúlaárið. Lærararnir eru 22 í tali.

### Dagsins tørvur

Stranda skúli varð bygdur í 1969 og í 1984 varð vaksið nakað um skúlan. Eftir tátíðar krøvum hevði skúlin fingið munandi betri umstøður, men í dag er øðrvísi.

Í eina tíð hevur tørvurin verið stórur á hølum og útgerð til dagsins tørv, men við avgerðini í bygdaráðnum er nú bati í eygsjón um nøkur ár.

Mett verður, at henda nútíðargerðin av skúlanum fer at taka millum trý og fýra ár. Men tá verður skúlin eisini munandi betri útgjørdur enn í dag.

Her verða í fyrsta umfari seks nýggjar og rúmsáttar skúlastovur, serstovur, størri bókasavn og lærarastova og annað, sum krevst.

Umframt hesa útbyggingina verður eisini skipað so fyri, at teir 22 lærararnir fáa hvør sína teldu.

Nevnast kann, at skúlarnir á Toftum og tann í Runavík eisini verða ávikavist útbygdir og nýgjørdir í hesum døgum.

## Stórar íløgur næsta ár



**Fuglafjørður:** Komandi ár verða gjørdar rættiliga stórar íløgur í Fuglafjarðar kommunu.

Í 2008 skal havnarlagið útbyggjast fyri 8 mió, nýggjur dagstovnur byggjast fyri 7 mió og útstykkjast skal fyri 6 mió krónur. Íløgukarmurin er íalt uppá 29,3 mió.

Mett verður, at inntøkurnar av skatti verða mettar til 44 mió krónur, við einum skattaprosenti uppá 21,5, og partafelagsskatturin 5 mió.

Fíggjarlógin javnvigar við 86,4 mió, og verður avlopið uppá 40.000 kr.

**sb.**

## Færri íløgur næsta ár

**Sørvágur:** Hóast skattainntøkan verður mett til 27,1 mió krónur, verða 10 mió færri játtaðar til íløgur í 2008, íalt 13,5 mió.

- Tað er ein sannroynd, at aktiviteturin innan byggivinnuna er sera stórur í hesum tíðum. Bygdaráðið metir ikki, at tað er ráðiligt at gera eins stórar íløgur í komandi ári, sum í skjótt farna ári, sigur Sørvágs kommuna.

Skattaprosentið er annars óbroytt, 20,5 og barnafrádrátturin 4000 krónur.

Seinnu árini er nógv gjørt fyri at fríðka um bygdirnar í kommununi, og er eisini peningur settur av til hetta í komandi ári.

**sb.**

## 24 mió inn – 40 út

**Sjóvar kommuna:** Á seinasta bygdaráðsfundi samtykti bygdaráðið fíggjarætlanina fyri 2008.

Sambært hesi verður eitt hall uppá 18 mió krónur komandi ár, hóast inntøkurnar verða mettar til 24,3 mió krónur. útreiðslurnar verða mettar til 40,3 mió og rentur og avdráttir til góðar 2 mió.

Størsta einstaka útreiðslan er tann omanfyri nevnda, nevniliga útbyggingin av Stranda skúla. Skattaprosentið hjá íbúgvunum í kommununi er 21,5 mió og barnafrádrátturin 4.500 krónur.

**sb.**

## Systkin fáa sama avsláttur



**Sjóvar kommuna:** Á seinasta fundi í bygdaráðnum vórðu gjøldini fyri pláss í vøggustovuni, barnagarði og frítíðarstovu samtykt. Frá 1. januar 2008 mugu foreldur gjalda 2200 krónur fyri eitt vøggustovupláss, 1775 kr. fyri eitt barnagarðspláss og 1100 kr. fyri eitt frítíðarstovupláss. Avslátturin fyri systkin verður kortini óbroyttur. Í Sjóvar kommunu búðu 1.022 fólk í september mánaði, men hugsandi er. at talið fer at vaksa í framtíðini, tí fleiri grundøki eru seld á Strondum hetta seinasta árið.

**sb.**